# Sambandslistin í Suðurstreymi liðugur

Listin hjá Sambandsflokkinum í Suðurstreymi er nú klárur. Flokkurin stillar upp 11 valevni

**Valevnini eru hesi:**
Annfinn Brekkstein, stjóri, Velbastaður
Súsanna Dam, bankakvinna, Tórshavn
Jákup Fróði Djurhuus, vinnurekandi, Tórshavn
Bent Jákup Hansen, varhaldsleiðari, Argir
Finnur Jensen, sølufólk, Tórshavn
Fríðálvur jensen, bygningssnikkari, Tórshavn
Jóhan Petur Johannesen, lærari, Argir
Kaj Leo Johannesen, fiskasølumaður, Tórshavn
Høgni Mikkelsen, býráðslimur, Tórshavn
Heðin Mortensen, løgtingsmaður, Tórshavn
Lisbeth L. Petersen, løgtingskvinna, Tórshavn

†

Tað verður hervið gjørt kunnugt,
at okkara kæri maður og pápi

**Finnur Olsen**

andaðist týsdagin 12. febr. 2002, 66 ára gamal.

Jarðarferðin verður úr Vesturkirkjuni
leygardagin 16. febr. kl. 13.00.

*Fyri tey avvarðandi*
**Maria og døturnar**

Tey, ið vilja minnast Finn, kunnu lata Føroya felag ímóti krabbameini eina peningagávu. Konto í peningastovnunum

# Finni Olsen til minnis



Henda alfagra mikumorgunin 13. februar vóru øll fløggini í Norðurlandahúsinum drigin í hálva stong. Finnur Olsen, húsavørður í Norðurlandahúsinum, var slóknaður dagin fyri, 66 ára gamal. Hann var føddur 7. februar 1936. Sjálvan 66 ára føðingardagin í síðstu viku vóru tey øll saman heima á Dalavegnum – og nú var tráðurin slitnaður.

Finnur var avlærdur á snikkaravirkinum í Hornabø hjá Kristoffer Toftenæs. Í 1956 keyptu Bjarni Skarðhamar, Alfred Gullbein, Kristoffer Toftenæs og Finnur virkið, og tað var selt aftur í 1966.

Finnur var virkin, hugagóður og vinsælur, tú kendi teg altíð væl í samveruni við honum. Á ungum árum var hann íðin og virkin í Skótaliði Sigmundi Brestissonar, og eisini var hann rovari. Frá hesum skeiði minnast vit Finn við góðu evnunum millum tey ungu.

Finnur fekk sær egið virki, tá tey høvdu bygt í Tórfinsgøtu, og Glas-Finn var heitið, sum varð kent víða um, rammur, glas, ja tað var ikki tann ting í samband við glas, sum hann ikki kundi. Og nógv kring um landið kendu Finn, og tey vóru mong, hann við arbeiði sínum gjørdi manga tænastu, og sum hann síðani hevði samband við.

Alt hevur sína tíð, soleiðis eisini við glasvirkinum hjá Finni. Hann seldi í Tórfinsgøtu og bygdi sær onnur hús á Dalavagnum, og høvdu tey eisini nógv góð ár har. Síðan var hann húsavørður í Norðurlandahúsinum, og var hann ikki minni drúgvur har.

Tá hann fylti 65 ár, gavst Finnur sum virkin arbeiðsmaður.

Vit drýpa høvur og minnast við sorgblídni aftur í árini. Mariu, døtrunum Barbaru, Súsonnu og Bjørg og Hannu, mammu Finn, saman við øllum tykkara, siga vit okkara djúpu samkenslu.

*jl*


Hyundai frá A-Z




Pininfarina, Italia, hevur teknað tann nýggja MPV frá HYUNDAI, ið er gjørdur til tað virknu familjuna. Innrættanin er smidlig við góðum plássi og gjørd til lagarligar loysnir, sum lætta um gerandisdagin. Ein sterk og sikkur kabina við útgerð, sum gevur tær kensluna av trygd. Motorveitingin er í topp, meðan brenniorka og ljóð eru lág. Alt hetta fæst fyri ein prís, sum er ótrúligur.
Soleiðis er Matrix: Meira fyri minni

**Trygdarútgerð:** 4 airbags, elektroniskt forsterkaðar ABS-bremsur við EBD, síðustoytbjálkar úr hástyrkistáli, stoytdoyvandi tilfar í síðustolpunum, nakkastuðlar við hæddarinstilling og trýpunktselar, sum kunnu hæddarinnstillast og við kraftavmarking.

**Modellvariantar:**

| | | |
|---|---|---|
| 1,6 GL bensin | 5 hurðar MPV | kr. 152.750,- |
| 1,8 GL bensin | 5 hurðar MPV | kr. 162.750,- |
| 1,5 GL. CRDI. diesle | 5 hurðar MPV | kr. 175.750,- |

HONDA NORÐBIL ŠKODA Volkswagen Group HYUNDAI
Box 1070 - Oyggjarvegur - FO 110 Tórshavn - Føroyar - Tlf. 313707 - Fax 310855


# Kósin keypir toskin hjá línubátunum

**Sum skilst gongur striltið hjá nøkrum virkjum at fáa nøktandi prís fyri saltfisk í løtuni, og tí er prísurin á toskin fallin. – Vit arbeiða saltfisk undir "hátrýsti", sigur ein væl nøgdur stjóri á Kósini, Adrian Dalsá.**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*

Línubátarnir í Klaksvík landa sjáldan aðrastaðni enn í Klaksvík. Og soleiðis var eisini hesaferð, nú teir komu aftur av túri – og onkur fyri veður.

### Hampiligir túrar

Adrian Dalsá, stjóri á Kósini, sigur, at virkið hevur keypt fiskin hjá línubátunum hesa vikuna. Onkur er komin, og onkur er á veg. Summir hava verið longri úti og aðrir stytri, nú hann øtlaði veðrið.

- Skipini hava gjørt hampiligar túrar; tey hava úr 100.000 pundum og uppeftir. Onkur eitt sindur minni, sigur stjórin.

Skipini, sum hava landað og fara at landa á Kósini hesa vikuna, eru eitt nú Jákup B, Klakkur, Nýpur og Kvik.

Onkur teirra hevur verið á Føroya Banka.

### Keypa ikki alt

Adrian Dalsá sigur, at Kósin í fyrsta lagi hevur lagt seg eftir at keypa toskin hjá línubátunum, og einir tríggir av bátunum hava væl av toski.

- Hvussu nógv vit keypa av øðrum fiskasløgum, er tengt at, hvussu nógvur toskur er inni, og hvat vit annars kunnu fáa burtur úr teimum ávísu fiskasløgunum. So, tað er eitt sindur ymiskt frá túri til túr, hvørji fiskasløg, vit keypa, og hvussu nógv vit keypa av hvørjum. Tað er sjáldan, vit keypa eina heila last, sigur hann.

### Gongur væl

Á Kósini er nógv fiskaarbeiði, og Adrian sigur, at øll, sum vilja vera til arbeiðis, eru til arbeiðis á virkinum.

Spurdur, hvussu gongst við saltfiskinum, nú tað frættist, at marknaðurin er trekur, letur stjórin væl at:

- Vit kunnu ikki lata illa at, tí hjá okkum gongur væl við saltfiskinum í løtuni,sigur Adrian.

### Saltfiskurin undir "hátrýsti"

Sosialurin hevur annars frætt, at prísirnir á toski á uppboðssøluni eru falnir í seinastuni, tí nøkur virki, sum virka saltfisk, liggja inni við stórum goymslum, sum ikki fæst nøktandi prísur fyri í løtuni.

Men Adrian Dalsá sigur, at Kósin telist ikki millum hesi virkir, tí – sum hann tekur til:

- Saltfiskurin hjá okkum er undir "hátrýsti" alla tíðina, og her sipar hann til, at Kósin keypir nógvan tosk og virkar nógvan saltfisk í løtuni.



# Kvinnufelagið skjøtil á valstríðið

**Kvinnufelagið í Havn vil hava kvinnulig valevni kring allar Føroyar at geva sítt boð uppá framtíð Føroya**

FRAMTÍÐ FØROYA
*Turið Kjølbro*

Altjóða kvinnudagin 8. mars setur Kvinnufelagið í Havn skjøtil á valstríðið upp undir løgtingsvalið, sum verður í seinasta lagi 30. apríl. Felagið skipar fyri politiskum fundi í Norðurlandahúsinum 8. mars kl. 20.00, sum er eitt fríggjakvøld. Í hesum sambandi verður heitt á øll kvinnulig valevni kring landið um at koma til tiltakið. Ætlanin er at hava eitt fundarborð til hvønn flokkin, sum síðani fær orðið í ávísari røð, ið verður avgjørd við lutakasti. Tann beinleiðis tillutaða talutíðin verður tríggjar ferðir fimm minuttir, har valevnini kunnu leggja fram hugsjónir sínar.

Orðaskifti verður millum flokkarnar aftan á hvørt umfar, og fólk í salinum kunnu seta skrivliga fyrispurningar til fundarluttakararnar.

Aftaná verður høvið at tosa víðari um politikk ella bara hugna sær saman við vinfólki og einum drekkamunni í forhøllini. Atgongumerkið til tiltakið er 50 krónur og tá er drekkamunnur íroknaður.

Kvinnudagurin er heldur tíðiliga í valstríðnum, og tí vónar Kvinnufelagið, at kvinnurnar fara at gera sum mest burturúr at greiða frá tí, tær meta um yvirornað mál og veruleikakend framtíðarynski fyri Føroyar. Sjálvt kundi felagið hugsað sær, at røtt verður um stór evni sum umhvørvi, búskaparstøðu, ríkisrættarligu støðu okkara, samfelagsskipan í eini komandi oljutíð, familjumynstur og harvið eisini støðuna hjá kvinnum, børnum og gomlum.

# Aftur á slóðina



**Sámal Bláhamar hevur í hyggju at skipa fyri ferð til kavbátasavnið í Kiel í Týsklandi, og á skjalagoymslur, har til ber at fáa upplýsingar um fólk, skip, kavbátar og annað undir krígnum. Sjálvur hevur hann góðar royndir av hesum, hevur nevniliga funnið fram til skiparan, ið søkti skipið, pápi hansara var við undir krígnum**

ÚTGÁVA
*Turið Kjølbro*

Í morgin, leygardagin 16. februar, eru 100 ár liðin síðani Frederik Bláhamar, skipari og høvundur, varð borin í heim. Í hesum sambandi verður bókin "Ein vandaferð", sum hann gav út í 1952, givin út á enskum undir heitinum "A Dangerous voyage". Bókin er eisini komin út á svenskum. Ensku útgávuni hava Poul Olvhøj úr Newcastle, ið er næstringur Frederik Bláhamar, og dóttur Frederik Bláhamar, Marin, staðið fyri.

Vandaferðin Frederik Bláhamar greiðir frá í bókini, er um minniligu ferðina undir seinna heimsbardaga, tá ið týskur kavbátur søkti skipið, Union Jack úr Vestmanna, sum hann var við. Tað eydnaðist manningini at sleppa í bjargingarbát og vinna upp land á Flannan Island. Seinni hevur sonur Frederik Bláhamar, Sámal, funnið fram til, hvør kavbáturin var og hvør skiparin á kavbátinum var, og leitað aftur á slóðina. Um hesa ferðina ber til at lesa um í sera áhugaverdari grein eftir Grækaris Magnussen í blaðnum í morgin.

- Øll míni barnaár havi eg hugsað um týskarar og alt, sum týskt er, sum nakað ringt. Setti mær fyri at finna út av, hvør skiparin var á kavbátinum, ið søkti skipið pápi var við, og til fyri stuttum visti eg ikki betur enn, at øll manningin doyði undir krígnum. Tí ætlaði eg at finna fram til næstringar hjá skiparanum, leitaði á internetinum eftir manninum, og tá vísti tað seg, at skiparin og aðrir av manningini vóru á lívi eftir kríggið, greiðir Sámal Bláhamar frá.




Sámal Bláhamar er í dag sannførdur um, at skiparin á kavbátinum ikki hevði í hyggju at gera seg inn á manningina á Vestmannabátinum.

- Skiparin kundi tað sama havt forkomið bjargingarbátinum, men tað gjørdi hann ikki, og tað eri eg sera takksamur fyri. Tí vildi eg takka næstringum hansara.

Sámal Bláhamar sigur, at tað er sera lætt at finna fram til fólk og fáa hendur á øðrum upplýsingum í Týsklandi.

- Alt er skrásett, væl skipað og sera lætt at finna fram til. Um onnur hava hug at leita nakað fram, er bara at fara í gongd.

Síðani Sámal Bláhamar hitti familjuna hjá týska kavbátaskiparanum og nakrar av manningini á kavbátinum, hevur hann fingið frið í sinnið.

- Eg havi fingið vinir fyri lívið. Týskarar eru als ikki ernir av síni fortíð, skammast av tí, sum er farið fram, men nú havi eg fingið eina aðra mynd av hesum fólkum, sum hava verið noydd at gjørt tað, tað tey vóru biðin um undir krígnum. Pápi mín tosaði ofta um vandaferðina, men nú angri eg, at eg ikki spurdi hann meiri til ferðina.

Sámal Bláhamar hevur í hyggju at skipa fyri ferð fyri áhugaðum til Týsklands, har vitjað verður á kavbátasavninum í Kiel. Á ferðini ber til at fara á skjalagoymslur at finna fram ávísar upplýsingar.

- Eg vildi mett, at áhugi er millum føroyingar at fara ein slíkan túr, eisini hjá søguáhugaðum. Havi samband við ein týskara, sum leggur ferðina til rættis í Týsklandi.

"Ein vandaferð" eftir Frederik Bláhamar er eitt søguligt skjal, og hevur tí varandi virði. Hon sigur frá føroyingum, sum sjófarandi tjóð, ið røkti sítt starv á havinum uttan slit, meðan heimsbardagin leikaði harðast. Hesir av "Union Jack" bóru boð í bý, teir vita, hvussu tað var. Høvundin, Frederik Bláhamar, var sjálvur við. Og hann greiðir í bókini frá uttan reyp og geip, sinniliga sannført, sum tað sømir seg røttum sjómonnum, sum úr vanda eru bjargaðir.

# Føroyar eftir kreppuna

**Verkætlan um vinnulívsmenning í Føroyum eftir kreppuna kemur út í bók mánadagin**

ÚTGÁVA
*Turið Kjølbro*

Fyrsta útgávan frá Granskingardeplinum fyri Økismenning kemur mánadagin. Talan er um bókina "The Restructuration of the Faroese Economy", sum Richard Apostle, Dennis Holm, Gestur Hovgaard, Ólavur Waag Høgnesen og Bjarni Mortensen hava staðið fyri.

Í tíðindabrævi frá Granskingardeplinum verður sagt, at bókin er eitt úrslit av eini granskingarverkætlan um vinnulívsmenning í Føroyum eftir kreppuna. Verkætlanin varð gjøgnumførd seinna hálvár ár 2000 og fyrru helvt av farna ári. Hon varð skipað við fýra sokallaðum útvaldum støðum: Klaksvík, Fuglafjørður, Tvøroyri og Vágur. Harumframt er ein sjálvstøðugur partur um menningina av føroysku alivinnuni.

Bókin vísir, hvussu íverksetarar, myndugleikar og feløg virka fyri nýskapan í føroyska búskapinum, ein menning, sum í stóran mun hevur røtur í lokalum viðurskiftum. Hendan hugsan verður undirbygd við bæði søguligum og nútíðar atliti.

Bókin, sum verður givin út av forlagnum Samfundslitteratur í Danmark, er gjørd við altjóða útgávu fyri eyga og er tí skrivað á enskum. Arbeitt verður eisini við eini føroyskari útgávu.


HESTPRENT



BØKUR, BØKUR, BØKUR
og alt annað prent

Dvørgastígur 7
100 Tórshavn
tel 314 555
fax 318 026
hestprent@hestprent.fo

Sosialurin -har tað hendir